DAGSINS MEINING

Demokratiska sinnalagið

Áhugavert er at síggja hvussu menn fyri alt í verðini royna at trútta og fylgja einari leið, ið ikki tykist hava undirtøku millum veljarnar.

Í hesi vikuni var ein fyrrverandi løgmaður í bløðunum og ráddi til at skipa eina minnilutasamgongu eftir valið og fylgja fullveldisætlanini. Er hetta ikki gott? Tað kann vera, men tað er jú tann evarska lítli vansin, at veljarin vil nakað annað enn ætlanina hjá samgonguni. Soleiðis er tað nú einaferð í einum demokratiskum samfelag. Missir ein samgonga meirlutan, ja so er tað tí, at veljarin vil nakað annað. Kanska er hetta eitt lítið mál hjá summum, men vit ditta okkum at meina, at hetta er ein stórur trupullieki hjá samgonguflokkunum.

Tað hevur verið sera lítið at hoyrt frá samgonguflokkunum viðvíkjandi framhald eftir eitt val. Vit síggja Sjálvstýrisflokkin tosa um pensiónsmilliónir og raðfesting í samband við Suðuroyarskipið, nú heilt stutta tíð eftir, at teir hava sent 356 milliónir retur til Nyrup. Hetta er ikki bara ótrúverdugt, og niðurger minnið á veljarunum, men eisini líkist hetta desperatión og valagn uppundir val. Tað er munur á at geva avkall upp á stórar milliónaupphæddir fyri so beint eftir at grenja um, at ov lítið er í kassanum til útbygging av infrastrukturi og pensjónum Sjáldan viðganga fólk ein brølara so skjótt aftaná, at hann er gjørdur.

Tjóðveldisflokkurin sigur ikki nógv um, at samgongan heldur fram eftir val. Spennandi verður at síggja, um hugurin at halda fram við Fólkaflokkinum verður so stórur, eftir at Fólkaflokkurin hevur trumfað privatisering av jørð Føroya fólks ígjøgnum og sett Breckmannska pensjónsskipan á stovn.

Fólkaflokkurin fær ringt við at skipa eina minnilutasamgongu eftir valið. Hetta merkir, at andstøðan er einasta alternativ. Ikki røkist fyri, at Tjóðveldisflokkurin fer at fylgja skilagóðu orðum Finnboga Ísaksons um, at man má síggja forbí blokkarnar,ið tykjast læsa seg fastar í føroyskum politikki. Harmiligt hevði verið, um Tjóðveldisflokkurin aftur fer at læsa seg fastan í ein alt ella einki politikk, ið merkir, at teir verða ein ævigur andstøðuflokkur eins og teir vóru í fimti og sekstiárunum, við undantak av sjálvstýrissamgonguni. Teir vóru í hesari óhepnu støðu inntil pragmatikararnir í flokkinum og ein sera erfarin floksformaður fingu flokkkin framat samgonguvaldi í sjeytiárunum, har teir vóru við at mynda stóran framburð og yvirtøkur. Vónandi lurta menn eftir erfaring - eisini í Tjóðveldisflokkinum. Ikki ber til at ignorera ein demokratiskan vilja og halda fram við eini ætlan, ið ikki hevur undirtøku millum fólk. Vísið nú demokratiskt sinnalag!

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Viðmerking til Sigvald Zachariasen

Kristian Magnussen
Løgtingsmaður

Í bløðunum í siðstu viku vísir tú á, at andstøðan er ongin loysn til verandi samgongu. Tú velur at viðgera 3 persónar, har eg eri ein teirra. Grein tín er merkt av frustratión yvir vánaligu útlitini hjá Sjálvstýrisflokkinum. Uppskriftin uppá hvussu Sjálvstýrisfokkurin kemur fyri seg aftur er einføld: takið í egnan barm, heldur enn at leggjast eftir øðrum, tá er vón um bata.

Tú sigur í grein tíni at eg royndi at forkoma ætlanini um at byggja Ellis- og Røktarheim í Norðurstreymi. Hetta eru beinleiðis ósannindi, og tí kundi eg hugsa mær at tú var meiri ítøkiligur, so lesarin kann meta um rættleikan av tínum pástandi.

Mín leiklutur í samband við hetta mál er tann, at tá uppskot Landsstýrisins um løgtingslóg um studningslán til ellis- og røktarheim í Norðurstreymoy var til viðgerðar í løgtingininum, vísti eg á saman við hinum, ið høvdu orðið, at tað ikki var rætt, at avmarka lógina til ávísar kommunur. Ein samd Trivnaðarnevnd, ið viðgjørdi lógaruppskotið, segði m.a. í álitinum " *Nevndin er av teirri áskoðan, at tað hevur stóran týdning, at landsstýrið í næstum leggur fyri Løgtingið løgtingslógaruppskot, sum endaliga ger av, hvussu ábyrgdarbýtið er millum land og kommunur við. ellis- og røktarheimum.*

Nevndin metir, at uppskotið er bara ein fyribils galdandi skipan, til slík avgerð er tikin. Hildið verður tó ikki, at rætt er, at uppskotna skipanin verður avmarkað til ávísar kommunur. Hon eigur at fevna um alt landið. At skipanin verður víðkað til alt landið, leggur tó ongar bindingar á komandi fíggjarlógir, av tí at skipanin í lógaruppskotinum í § 2 hevur fyrivarni um, at hon er avmarkað av játtanini á løgtingsfíggjarlógini.

Nevndin tekur undir við ætlan landsstýrisins at raðfesta bygging av ellis- og røktarheimi í Norðstreymoy."

Eitt samt løgting tók undir við broytingaruppskotinum frá einari samdari trivnaðarnevnd um at lógin skuldi fevna um alt landið.

Annars kann eg upplýsa teg um at Sámal P. í Grund undir viðgerðini av fíggjarlógaruppskotinum fyri næsta ár, segði at íløgan í ellis- og røktarheim í Norðurstreymið skuldi strekkjast yvir eini 2 -3 ár, tí játtanin í uppskotinum ikki er nøktandi. Sostatt verður heimið í Norðurstreymoy væntandi ikki liðugt fyrr enn í 2005. Við øðrum orðum so hevur Sjálvstýrisflokkurin, ið hevur havt ábyrgdina av almannamálum síðan 1998, væntandi bert klára at veita fígging til uml. 3 nýggj røktarheimspláss um árið í 8 ár. Við hetta lag klárar Sjálvstýrisflokkurin at nøkta verandi bráfeingistørv á ellis og røktarheimsplássum, ið er umleið 200, um eini 70 ár.

Lat meg enda við at vísa á brot úr valskránni hjá Javnaðarflokkinum til komandi val.

"Bráfeingistørvurin á ellis- og røktarheimsplássum er so stórur, at Javnaðarflokkurin setir sær fyri, at komandi fýra árini verða neyðugar íløgur settar av á fíggjarlógini, soleiðis at 160 nýggj ellis- og røktarheimspláss verða tøk. Landskassans partur av íløguni verður uml. 80 mió. kr. í fýra ár. Javnaðarflokkurin vil veita kommunum trygd fyri, at landskassans partur av íløgum og rakstri verður játtaður."

Teir flokkar, ið hava ætlanir um samstarv við Javnaðarflokkin aftaná komandi løgtingsval, eiga at gera sær greitt, at vallyfti Javnaðarfloksins, um í minsta lagi 160 nýgg ellis- og røktarheimspláss er eitt krav.

Trupul børn

Marjun av Steinum
Hvalvík, 24.10.01

Í Sosialinum 12.okt. skrivar Hans Eli Dahl, settur stjóri á Sernámsdeplinum, um atferðartrupul børn. Dagin fyri bar Útvarpið tíðindir um, at trupul børn fáa ikki stuðul, vegna ov lága játtan á fíggjarætlanini.

Trupul børn, atferðar trupul børn, hvørji eru tey, hvussu blíva tey eyðmerkt undir hesum, og hvat er tað, sum skal til, fyri at eitt barn kann koma undir hetta heiti. Eg meini, at tað hevði verið lættari fyri barnið og foreldrini, um vit heldur siga: børn við atferðartrupulleikum, tað gevur pláss fyri so nógvum ørðum sterkum síðum, sum barnið sjálvsagt eisini hevur. Á sama hátt,sum Doris Hansen greiddi frá, nú tey hildu 20 ára føðingardag fyri MBF, vit siga ikki brekaði børn, men børn sum hava brek, tí tey hava eisini so nógvar aðrar eginleikar.

Møguliga er tað soleiðis, at hetta bert er blivin ein máti at tosa uppá, uttan at hugsa meira yvir, hvat liggur í orðinum. Og tí kundi tað verið gott, at Sernámsdepulin kom við eini frágreiðing um, hvussu tit síggja barnið og hvørjar visiónir hevur depilin fyri framtíðina hjá børnunum/foreldrunum.Og hvat heldur depilin um tankan at síggja barnið og foreldrini sum eina heild. Børnini kunnu vera berarar av teimum trupulleikum, sum familjan stríðist við. T.d. kann barnið blíva hyperaktivt, inaktivt ella hava innlæringartrupuleikar o.s.v. Sagt við ørðum orðum, reagerar barnið uppá nøkur viðurskiftir, sum eru strævin at liva við. Her má tað verða ein fyrimunur saman við foreldrunum at finna útav, hvussu trupulleikin kann loysast, so barnið merkir, at tey vaksnu taka ábyrgd. Tað er altíð ivingarsamt, tá tað verður væntað av barninum, at tað skal broyta seg.

Barnaøkið má vera høgt prioriteræd, og tað eigur ikki at bera til beinleiðis at rokna við, at fleiri børn, sum hava hjálp fyri neyðini, skulu bíða til fánítis.Tískil hevði tað verið skilagott at hugt uppá hvørjir aðrir møguleikar eru, og um ætlanin, sum ein nevnd við Tóru Tóroddsdóttir m.a., er verd at royna? Børnini í dag koma at vera framtíðar mammur og pápar og tí eiga vit at geva teimum størri ans.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

VIÐMERKINGAR

Valagn fólkafloksins

Birgir Mohr
Sandi

Uppskot landsstýrisins til løgtingslóg um »sølu« av almennu jørðini og endurskipan av skuld hjá bøndrum samt lóg um búnaðargrunn skal nú koma fyri løgtingi sigur landsstýrismaðurin hjá fólkaflokkinum í búnaðarmálum v.m. Tað gongur nú við rúkandi ferð á hesum økinum, men veit nakar, hvar vit fara?

Sambært Dagblaðnum skal Fólkaflokkurin nú vera garantur fyri, at eingin spekulatión verður við føroysku jørðini! Men hvør trýr slíkum? Danir hava eitt orðatak um »at biðja revin ansa eftir gæsnum«!

Valla er landbúnaðarálitið sodnað, so er lógaruppskotið gjørt. Tað man vera tað at valið nærkast, sum skundar undir, men hastverk er og verður lastverk. Minnist til »rilliskriðakunngerðina« frá sama landsstýrismanni.

Ein leggur merki til, at landsstýrismaðurin ikki fylgir álitinum hjá nevndini, sum mælti til *ikki* at »selja fjøllini«, tí hesi verða mett sum almenn ogn. Nevndin mælti til bert at »selja« inngangarðsjørð?

Landsstýrismaðurin sigur ikki, hví hann er ósamdur og vil avhenda alla landsins jørð – innan- og uttangarðs?

Tó at nevndin staðfestir, at júst festiskipanin hevur verið garantur fyri støddina av almennu gørðunum, so teir ikki vóru sundurskiftir, so fyrislær bæði nevndin og almenni myndugleikin at avhenda hesar eindir og gera alt privat. Men vil so við servituttum fyribyrgja, at sama jørð síðani verður sundurbýtt ella nýtt til annað endamál enn landbúna. Hetta er helst óklókt, at fremja, at fremja hesa avhending – óneyðugt.

Um slíkt fer at hepnast í framtíðini kann so ein og hvør meta um, men ein kann væl hugsa sær, at hendir hetta, so kunnu hesir servituttir verða strikaðir stutt inni í framtíðini, kanska enntá og sama myndugleika. Tí hetta er og verður fiks-faksarí bæði juridiskt og handilsliga og ein »atgerð« á ognarrættin, sum higartil hevur verið tryggjaður í grundlógini. Hetta er tí – og eigur eisini at vera tað – sera ivasom framferð, at tangera grundlógina.

Allir núverandi festarar fáa sum útgangsstøði framíhjárættindi til at ogna sær festijørðina – uttan teir, sum hava leigutraðir. Hesir kunnu ikki ogna sær leigutraðirnar, men skulu tvørturímóti rokna við at skula lata hesar aftur til festigarðarnar, sum tær eru innlagdar frá. Hetta er óréttur og mannamunur. Her er ikki hugsað um smámannin, tað er vist.

Síðan skulu komandi eigarar av landbúnaðarjørðini lúka ávísar minstukrøv til førleika fyri at røkja jørðina, húsdjór ella landslag. Ilt at vita, hvat hetta kemur at merkja. Men verandi festarar skulu ikki lúka onnur førleikakrøv enn higartil: førarabrøv til »gravkúgv«. Hví?

Um ein kemur at ogna sær jørð frá tí almenna, sum ber meira enn 50 áseyðir, so skal ein flyta til markatalsbygdina. Hetta eru harðar treytir, tí tað er óneyðugt, ferðamøguleikarnir millum bygdir eru góðir og vónandi í betring í dag, og fleiri av markatalsbygdunum eru útdeyðar. Tað krevst eingin bústaðarskylda fyri at avvarða 50 hagaseyðum! Tað er sjálvandi øðrvísi við stórdýrum.

Verandi festarar kunnu ogna sær almennu jørðina eftir mettum prísi, sum er fingin til vega út frá meting eftir, hvat jørðin hevur kastað av sær. Ikki eftir, hvat marknaðarprísurin á jørð er? Marknaðarkreftir og liberalisma eru gloymd – men fólkaflokkurin sigst vera liberalur? »Liberalisma á høkjum« – sum ikki einaferð!

Tað er ógreitt, um festarin noyðist frá sum bóndi, um honum tørvar almenna sanering fyri at halda fram, men helst skal útgangsstøði nú skiljast so?

Tað stendur í uppskotinum, at fornminni o.a.l. ikki skulu avhendast saman við jørðini, men tað er ikki heilt greitt tilskilað. Skulu til dømis fornminnini í Koltri, sum Fornminnisfelagið hevur bekostað so nógvan pening at seta í stand, nú latast einum persóni sum ogn? Tá verður Koltur við fornminnum at sammeta við oynna hjá Onassis, sála, í Ægæarahavinum. Men tað er kanska í tráð við ætlaða politikkin í Føroyum á hesum økinum? Hvussu sleppur almenningurin tá til fjøllini í Koltri? Tað sigst, at gjaldast skal longu fyri at koma upp á land í Koltri til privatfólk? Eg veit tó ikki, um so er!

Møguleiki skal gerast fyri at stovna kunstig partafelløg til bóndur – einmansfelløg. Hetta ljóðar sera merkantilt og fakliga vælkvalifiserað.

Men bert ein eigari má standa fyri einum bóndagarði í framtíðini. Og »keypsprísurin« verður settur eftir meting, sum skal byggja á 5 teir seinastu ársroknskapirnar. Tað logiska av hesum má so vera, at vísa hesir hall, so verður ognin helst fingin fyri einki til ognar – ella tað fylgja kanska pengar við fyri at ogna sær garðin úr jarðargrunninum. Og festileigan skal setast so høgt, at øll tvingast at ogna sær festini.

Teir donsku pengarnir, sum eru í Jarðargrunninum, skulu flytast í ein nýggjan búnaðargrunn til hesi fáu útvaldu fólkini at arbeiða við. Hesir donsku pengarnir lukta ikki – tað eru bert teir donsku í blokkinum, sum lukta so illa, og tí verða sendir aftur til Danmarkar. Hví hendan vinnan ikki kann arbeiða við vanligu peningastovnunum, ja, tað er tað als eingin forkláring uppá.

Ein nakað stór umsiting skal til – í hvussu so er fyrstu árini. Hon skal ikki gjaldast úr Búnaðargrunninum. Nei, hon skal flytast úr Jarðarráðnum, sum skal niðurleggjast, og síðani økjast undir Vinnumálastýrinum og Palleba og Marsanna skulu gjalda gildið. Tað var til seinasta val, at fólkaflokkurin vildi minka almennu útreiðslurnar til miðfyrisiting, ikki neyðvendigvís til komandi val?

Felags fyri allar ásetingar í komandi lógini er, at landsstýrismaðurin skal hava heimild til at gera undantøk. Tað er jú ein sjálvfylgja? Og ein hópur av kunngerðum skal koma at fylgja lógini upp, sum Vinnumálastýrið skal útarbeiða og landsstýrismaðurin seta í verk – júst sum við »rilliskriða-kunngerðini«? Rættartrygdin verður so í lagi, tað eiga vit at vænta.

So tann, sum ætlar sær at vera bóndi í framtíðini, hann eigur at vera væl við landsstýrismannin í búnaðarmálum.

Kemur hetta uppskot óbroytt ígjøgnum Føroya Løgting, so er ikki væl vorðið her, tað er vist. Men tað vænti eg ikki, tí hetta er ikki nakað vælaverk, hetta er valagn – valflesk hjá fólkaflokkinum.

Privatu búnaðarjørðina hevur landsstýrismaðurin ikki torað at lóggeva fyri – tað er helst skilagott av honum, so tað skal hann hava rós fyri.

Arbeiðsmøguleikar hjá heilsuliga skaddum

TÍÐINDASKRIV

Viðv. pallborðsfundinum hin 7. nov. 2001 um arbeiðsmøguleikar hjá heilsuliga skaddum

Her á landi hava vit ongan skipaðan politikk, tá tað snýr seg um arbeiðsmøguleikar hjá heilsuliga skaddum – tað tey í grannalondunum nevna »hin rúmliga arbeiðsmarknaðin« og »sosiala ábyrgd á arbeiðsplássum« – og hava vit heldur ongan skipaðan almennan sjúkrapolitikk. Harafturímóti hava vit eina 120 daga-uppsagnarreglu í lóg um starvsmenn frá 1958, ið hevur við sær, at heilsuliga skadd, ið ikki orka at arbeiða til vanligar treytir, verða uppsøgd og harvið stoytt út av arbeiðsmarknaðinum.

Sambært lógarbroyting av forsorgarlógini nr. 177 frá 30.12.1997 ljóðar § 18 a soleiðis: »Játtast kunnu vard størv, vinnuroyndir, umskúling v.m. til avlamin og onnur, sum av einhvørji orsøk eru vorðin avmarkað í sínum vinnuførleika. Lønarískoyti til vardu størvini kann veitast«. Sjálvt um áðurnevnda grein um vart starv v.m. varð broytt fyri skjótt fýra árum síðani, virkar greinin framvegis ikki eftir ætlan. Almannastovan (endurbúgvingardeildin) sigur, at heilsuliga skadd kunnu ikki fáa vart starv sambært hesari grein – hetta tí Almannastovan onga reglugerð hevur at arbeiða eftir!

Grundað á verandi støðu, hava heilsuliga skadd **sera trupult** við at fáa – ella varðveita tilknýti til arbeiðsmarknaðin.

Tá fólk verða søgd úr starvi orsakað av varandi sjúku/skaða, kenna tey seg tískil aloftast ikki hava annað val enn at søkja um avlamispensión (fyritíðarpensión) og liva eitt óvirkið lív sum avlamispensiónistur. Hetta er sera ring støða at koma í, ikki minst fíggjarliga. Fólk, ið einans hava pensiónina at lívbjarga sær við, eru sera illa stødd. Avlamispensiónirnar í Føroyum eru **sera lágar**, serstakliga illa stendur til hjá teimum, ið bert fáa lægstu avlamispensión: støk fáa í mesta lagi kr. 5.439 um mánaðin og gift fáa í mesta lagi kr. 4.333 um mánaðin. Tilsvarandi pensión í Danmark (forhøjet alm. førtidspension) er ávikavist 9.636 og kr. 7.348 um mánaðin.

Pensiónslóggávan í Danmark verður í næstum broytt, soleiðis at einans tey, sum hava rætt til hægstu avlamispensión, fáa pensión í framtíðini. Tey, ið hava rætt til miðal og lægstu avlamispensión, skulu harafturímóti ikki hava pensión, men skulu hava arbeiðstilboð frá tí almenna: vart starv ella annað, ið hóskar til avmarkaða arbeiðsførleikan. Í hesum sambandi er áhugavert at hoyra, hvørjar framtíðarhugsanir- og ætlanir politikarar, almennir myndugleikar og onnur hava viðvíkjandi arbeiðs- og pensiónsviðurskiftum hjá heilsuliga skaddum her á landi.

Arbeiði er týdningarmikil partur av lívinum. Umframt at arbeiða er ein háttur at vinna pening til lívsins uppihald, er tað ein avgerandi fyritreyt fyri samleikan hjá fólki. Hjá flestum kennist tað sera álvarsamt at missa tilknýtið til arbeiðsplássið/arbeiðsmarknaðin. Gott arbeiði gevur lívinum positiva meining og innihald.

Politikarar, almennir myndugleikar, Almannastovan, fakfelløg, arbeiðsgevarar, og arbeiðspláss sum heild mugu taka arbeiðsumstøðurnar hjá heilsuliga skaddum til viðgerðar og skipa soleiðis fyri, at rúmd eisini verður fyri heilsuliga skaddum á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Í sambandi við at MBF fylti 20 ár verður skipað fyri pallborðsfundi í læraraskúlahøllini í Tórshavn mikukvøldið hin 7. november 2001 kl. 19.30.

Fundarevni snýr seg um **Arbeiðsviðurskifti hjá heilsuliga skaddum.**

Pallborðsluttakarar: Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, Marius Dam, limur í Trivnaðarnevnd Løgtingsins, Petra Joensen, Almannastjóri, Vilhelm Johannesen, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Kristina Larsen, fyristøðukvinna fyri ALV, Gunnleivur Dalsgarð, Fakfelagssamskipanin/7-manna bólkurin, Pál Weihe, læknaráðgevi hjá Almannastovuni, Ingrid S. Henriksen, frá Giktafelag Føroya, og Johan Samuelsen, limur í ÍSB.